
















Grønt frítíðarøki í Norður-Keypmannahavn

Keypmannahavnar kommuna er farin at skipa lendið fram við Rovsinggøtu móti Lyngbyvegi sum spæliplass og fritíðarøki. Men enn er støðan ikki endaliga tikin um, ...at hetta økið — 16.000 kvadratmetrar — skal nýtast til.

Kommunumenn seta nú beinkir upp, smíða smáhús og gera vøllir til bóltspøl.

Umhvørviseftirlitið hevur kannað økið fyri asfalt- og blýeitran, men ti viðvíkjandi er einki at finnast at, sigur Jens Kramer, yvirborgarstjóri.

Trøll á aljósum degi

Um nýggju teknisøguna TRØLL

Fyrsta teknisøgan um trøllini er komin í bókabúðirnar. Arild Midthun og Terje Nordberg hava skrivað og teknað, og Pauli Hansen hevur týtt úr norskum.

Fyrsta heftið eitur SILVURIÐ. Her hitta vit forherðingin Sjúrð Hvassa, ið er farin niðan í fjøllini at leita eftir horvna silvurnaminum hjá Christiani kongi Fjórða. Søgnin sigur, at trøllavættrar róku kongsins menn úr náminum. Sovorðnum søgnum trýr Sjúrður Hvassi ikki, men eitt er, ið hvussu so er, vist: Tað, sum fekk kongsins menn at flýggja á sinni, er enn millum fjallana. Tað má Sjúrður Hvassi eisini sanna, tá ið hann kemur í høslag við trøll ...

Hetta er spennandi og stuttligt teknisøga, ið er 48 síður og kostar 44 kr. Føroya Lærarafelag gevur út.

Vendelbo
Marmuláta 1 kg
Best og bíligast og í fittari leikuspann til børnini.

